# Eyðmerking av laksa- og seiðalús

Sambært kunngerð nr. 75 frá 28. juni 2016 um yvirvøku og tálming av lúsum á alifiski skulu vaksnar kvennlýs (laksalýs), stórar flytførar laksalýs (>5 mm), smáar flytførar laksalýs (<5 mm), seiðalýs og fastar lýs teljast og skrásetast minst 14. hvønn dag.

Bæði laksa- og seiðalýs hava 8 búningarstig, men munur er á býtinum millum búningarstigini hjá sløgunum. Bæði sløgini byrja við trimum pelagiskum búningarstigum, har tað síðsta er tað, ið setur seg á fiskin. Síðani hevur seiðalúsin 4 føst búningarstig, áðrenn hon fer beinleiðis til tað seinasta og vaksna búningarstigið. Laksalúsin hevur hinvegin einans 2 føst búningarstig, men kemur umvegis 2 flytfør búningarstig til tað seinasta og vaksna búningarstigið.




Fastar lýs kunnu eyðmerkjast við at skumpa varisliga undir tær. Um lúsin er føst, sveiggjar hon álíkt eini klokku.



Munir á laksa- og seiðalús

Tá ið tær eru vaksnar, er laksalúsin væl størri. Laksalúsin er meira rundleidd. Tað eru serstakliga tær smærru flytføru laksalýsnar og seiðalýsnar ið kunnu vera truplar at skilja at. Um skumpað verður varisliga undir tær, fara seiðalýsnar aloftast rennandi avstað, meðan laksalýsnar ikki hava hug at flyta seg.



Á myndini er seiðalúsin til høgru.




Á myndini omanfyri, sæst (A) ein einsamøll vaksin kvennlaksalús, (B) ein vaksin kvennlaksalús (ovara lúsin), ið nørist við einari vaksnari kalllaksalús (niðara lúsin), og (C) ein stór flytfør kvennlaksalús (ovara lúsin), ið nørist við einari vaksnari kalllaksalús (niðara lúsin).

Tá ið ein vaksin kvennlaksalús nørist, er skjótt at vaksna kalllaksalúsin ikki verður tald við. Tá er gott at hava í huga, at kynsgøgnini eru langleidd. Síggja kynsgøgnini hinvegin rund út, er vert at eftirkanna um ein vaksin kalllaksalús situr á teimum.

Á líknandi hátt kann ein stór flytfør kvennlaksalýs ið nørist við vaksnari kalllakslús við fyrsta eygnakast fatast sum ein vaksin kvennlaksalús. Tá er vert at minnast til at kroppur og kynsgøgn á vaksnari kvennlakslús ikki eru eins stór.

Veruliga støddin á lýsnum




Fiskaaling